## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og suðri og sólglottar, men eisini támut. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt og támut, men um kvøldið regn ella mjørki. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og yvirhøvur turt, men mjørki í støðum. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og suðri og támut veður og sirm av og á. Hitin millum 5 og 8 stig.

# Grannar mótmæla barnagarði hjá Føroya Tele

**- Hóast vit vilja hjálpa okkara starvsfólkum í at fáa stovnspláss til teirra børn, er tað ikki gott fyri okkara umdømi, um vit gera ímóti ynskjunum hjá einum heilum íbúðarøki, sigur Andras Róin, stjóri í Føroya Tele**

BARNAGARÐUR
*Turið Kjølbro*



*Fólk í Ísaksgøtu í Hoyvík mótmæla ætlanunum hjá Føroya Tele at keypa hús í gøtuni til barnagarð. Barnagarður gevur nógvan larm og økta ferðslu, siga grannarnir. Myndin er tilvildarliga vald.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað kemur tvørs fyri hjá Føroya Tele, at fólk í Ísaksgøtu í Hoyvík mótmæla, at sethús í økinum verða keypt til barnagarð. Fyrrakvøldið fekk stjórin á Føroya Tele, Andras Róin, handað mótmælisskriv frá fólki har um ætlanina at gera eini sethús í økinum um til barnagarð.

- Vit hava leitað eftir egnaðum húsum í eitt hálvt ár. Tað er ógvuliga ringt at finna eini hóskandi hús, tí nógv viðurskifti skulu vera í lagi, og tí hevur tað gingið ógvuliga striltið. Eini 15-20 hús hava verið upp á tal. Hesi vit nú hava funnið í Ísaksgøtu lúka krøvini eftir at vit byggja tey eitt sindur um. Mær vitandi hevur umsitingin í Tórshavnar býráð góðkent formellu krøvini. Vit eru væl greið yvir, at ein barnagarður førir við sær økta ferðslu. Ísaksgøta liggur ovast uppi í Løgmannabreyt og tað ger, at ferðslan í økinum verður økt munandi. Vit eru ikki áhugað í at lata barnagarð upp í økinum, um grannarnir mótmæla. Endaliga avgerðin er ikki tikin enn, men møguliga verður hetta keypið av ongum orsakað av mótmælinum. So hóast vit vilja hjálpa okkara starvsfólkum í at fáa stovnspláss til teirra børn, er tað ikki gott fyri okkara umdømi, um vit gera ímóti ynskjunum hjá einum heilum íbúðarøki. Eg skilji væl, at fólk mótmæla økta ferðslu, sigur Andras Róin.

Føroya Tele hevur ætlanir um at gera ein barnagarð til 30 børn, harav tey 15 plássini verða oyramerkt til børn hjá starvsfólkum á stovnum. Børn í økinum, har nýggi barnagarðurin skal vera, hava ikki framíhjárætt til stovnspláss, men verða tikin inn sambært vanligu upptøkureglunum, sum eru galdandi hjá kommununi.

Stjórin á Føroya Tele vil ikki upplýsa kostnaðin av keypinum og umbyggingini av sethúsunum í Ísaksgøtu. Ein avtala fyriliggur millum Tórshavnar býráð og Føroya Tele um, at kommunan rindar 20 prosent og stovnurin 80 prosent av keypskostnaðinum.

- Verður hetta keypið av ongum, kunnu vit ikki gera annað enn at vóna, at eini onnur hús koma undan kavi, sum lúka allar treytirnar og sum liggja eitt sindur fyri seg sjálvi, sigur Andras Róin at enda.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷14 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 3 |
| Ammassalik | ÷1 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 1 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 3 |
| London | 6 |
| Tromsø | ÷9 |
| Bergen | 0 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | ÷2 |
| Keypmannah. | 3 |
| Helsinki | ÷4 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 3 |
| Warzawa | 2 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 5 |
| Paris | 11 |
| Madrid | 7 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 15 |
| Athen | 13 |
| Malta | – |
| Tunis | 15 |
| Beijing | ÷5 |
| New Dehli | 15 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | – |
| New York | ÷1 |
| Miami | 12 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 33 |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 22 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Hátrýstið við Skotland fer spakuliga eystureftir og eitt lágtrýst við New Foundland fer í landnyrðing.




Hátrýstið eystanfyri Skotland fer spakuliga eystureftir og lágtrýstið sunnan fyri Hvarvið fer norðureftir og dýpist.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 10/01 kl. 06[00]–11/01 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 3,1°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

### AVFALL




Avfallið: 0,2 mm – mált frá 10/01 kl. 06[00]–11/01 kl. 06[00]
Avfallið higartil í januar: 71,9 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

9. jan.: Fullmáni
10. jan.: Mánin næstur jørðini
16. jan.: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. jan | 08:41 | 21:08 | 07:41 | 20:08 | 07:56 | 20:23 | 10:41 | 23:08 | 11:41 | – | 06:56 | 19:23 | 05:56 | 18:23 | 08:56 | 21:23 | 09:56 | 22:23 | 08:26 | 20:53 | 09:41 | 22:08 |
| 13. jan | 09:35 | 22:00 | 08:35 | 21:00 | 08:50 | 21:15 | 11:35 | – | 00:08 | 12:35 | 07:50 | 20:15 | 06:50 | 19:15 | 09:50 | 22:15 | 10:50 | 23:15 | 09:20 | 21:45 | 10:35 | 23:00 |
| 14. jan | 10:26 | 22:49 | 09:26 | 21:49 | 09:41 | 22:04 | 00:00 | 12:26 | 01:00 | 13:26 | 08:41 | 21:04 | 07:41 | 20:04 | 10:41 | 23:04 | 11:41 | – | 10:11 | 22:34 | 11:26 | 23:49 |
| 15. jan | 11:12 | 23:48 | 10:12 | 22:48 | 10:27 | 23:03 | 00:49 | 13:12 | 01:49 | 14:12 | 09:27 | 22:03 | 08:27 | 21:03 | 11:27 | – | 00:04 | 12:27 | 10:57 | 23:33 | – | 12:12 |

www.sosialurin.fo